**Europa Cup hjá Gí og HB** síða 9-13

# tíðinda sosialurin blaðið

7,-

Nr. 160 ★ hósdagur 25. august 1994

Dómarin ov stórur biti hjá Dan Klein:



# Skal sita 60 dagar í fongsul



Bretski oljuráðharrin:

## Trætan um markið ikki til Haag



**Jan Müller, Stavanger:**
Bretski orkumálaráðharrin, Tim Eggard, ivast ikki í, at tað fer at eydnast føroyingum og bretum at semjast í marknaðatrætuni millum londini, hóast kinkur er í samráðingunum í løtuni.

Hetta segði hann við føroyskar tíðnindamenn á oljuráðstevnuni í Stavanger í gjár.

Hann helt ikki at marknaspuringurin endar við altjóða dómstólin í Haag.

Tim Eggard viðgekk, at ósemjan um markið er eitt torgreitt mál, sum krevur sína tíð at verða loyst. Við hesum sipaði hann millum annað til ta drúgvu tíð tað tók bretum og írum at røkka eini semju í teirra marknatrætu. Breski orkumálaráðharrin metti bretar at hava sera drúgvar royndir í altjóða marknaspurningum. Á tíðindafundinum kom hann at brúka orðið "dispute", sum merkir ósemja. Seinni tók hann hetta orðið í seg aftur og kom við umberðing fyri at hava brúkt hetta orðið.



**Fyri sjeyndu ferð seinastu 11 árini varð Dan Klein í gjár dømdur fyri ærumeiðing. Hesuferð kostaði skrivingin honum 60 dagar í fongsul, umframt at hann skal rinda dómaranum 20.000 kr. fyri tort.**

síða 4-5




*Norskir jarðfrøðingar halda, at føroyska økið er partur av sama stóra landgrunnsøki sum Vøring út fyri Norðurnoregi. Teir halda at jarðfrøðin her er tann sama og um nakrar fáar mánaðir sleppa tey stóru oljufeløgini at bora eftir olju í Vøringbassenginum. Norðmenn halda, at tað sær sera lovandi út at finna olju í hesum økinum*

*Føroyar í fokus á oljumessu í Stavanger*

# Statoil stórar vónir til tað føroyska økið

*Jan Müller úr Stavanger*

Ikki færri enn 1.000 feløg úr 22 londum eru við á ársins størstu oljuráðstevnu, sum verður hildin í norska oljubýnum Stavanger alla hesa vikuna. Hóast Føroyar ikki vanliga vera knýttar at oljuspurningum og heldur ikki hava havt nakran serstakan áhuga millum oljufólk, so tykist nú bráddliga vend at vera komin í.

Hetta er í hvussu er tann fatan tú fært, tosar tú við fólk frá stóra norska oljufelagnum Statoil. Hóast talan er um eina altjóða messu, so er greitt, at Statoil er frammaliga í orðaskiftinum um oljuspurningar í framtíðini.

At Statoil hevur stórar vónir til eina komandi oljuvinnu í Føroyum kemur ikki minst til sjóndar í tíðarritinum »Statoil Magasin«, sum kom út júst um somu tíð sum stóra oljuframsýningin varð sett.

Føroyar eru á forsíðuni, og inni í blaðnum er stór og sera áhugaverd grein um Føroyar sum framtíðar oljuøki. Norskir jarðføðingar, sum í longri tíð hava kannað eitt risastórt øki út fyri Miðnoregi, kalla »Vøringbassenget«, halda, at hetta er partur av einum nógv størri øki frá dýpinum vestan fyri Írland víðari fram við Føroyum og fyi síðani at enda í Vøring vestan fyri Miðnoreg.

Norskir jarðfrøðingar, sum hava góðar vónir um at finna olju í Vøringøkinum, ið kann blíva eitt nýtt Statfjordfelt, halda nú, at jarðløgini eru tey somu við Føroyar sum í Vøringøkinum. Teir kalla alt hetta stóra og áhugaverda økið fyri »The Western Slope«.

Vidar Larsen, leiðandi jarðfrøðingur hjá Statoil, sum er við á oljuráðstevnuni í Stavanger í hesum døgum, sigur við Sosialin, at upplýsingarnar teir hava fingið um Vøringøkið kunnu fáa sóran týdning fyri kanningarnar í føroyska økinum. Okkurt bendir á, at jarðfrøðin í báðum hesum økjum er tann sama.

## Vøring álltið

Hann sigur víðari, at allur tann norski oljuídnaðurin nú setir sítt álit á nýggja Vøringøkið. Ætlanin er at bjóða tað út í kassar til tey stóru oljufeløgini um ársskifti. Tey fara so alt fyri eitt at bora og vóna norðmenn, at Vøring kemur at avloysa stóru keldurnar í Norðsjónum, sum so spakuliga eru við at tømast.

Tá júst Vøringøkið er so lovandi, og tað er partur av einum og sama landgrunni, sum røkkur heilt til Føroya, so er greitt, at norðmenn vísa føroyska økinum serligan ans. Teir síggja her ein møgueika at kunna brúka vitanina frá kanningunum á Vøringøkinum í eini komandi arbeiðsuppgávu í tí føroyska partinum av »The Western Slope«.

Tað, at BP hevur funnið tvær stórar oljukeldur vestan fyri Hetland, t.v.s. í hesum sama stóra landgrunnsøki, frøðir norðmenn, tí tað gevur teimum eina ábending um, at olja uttan iva eisini finst longur norðuri, t.v.s í Vøringøkinum.

Norðmenn fylgja tí sera væl við, hvat hendir í økinum millum Føroyar og Hetland. Tað kann geva teimum ábendingar um, hvat møguliga er at finna hjá teimum sjálvum.

Tað er greitt, at norðmenn eru altráir eftir at finna nýggj oljuøki, tí stóru oljukeldurnar í Norðsjónum eru við at tømast.

Statoilfólk Sosialurin hevur tosað við á oljuráðstevnuni í Stavanger siga, at leiðslan í Statoil er sera spent um, hvat fer at spyrjast burtur úr teimum seismisku kanningunum, sum verða gjørdar við Føroyar í hesum døgum.

## Vil vera við

Tá tað kemur hartil, at økið við Føroyar skal býtast út til tey stóru oljufeløgini at fara undir boring, so dylja Statoilfólk ikki fyri, at felagið er sinnað at vera við í oljuleitingini við Føroyar. Hetta bæði tí at tað longu nú hevur nakrar metingar um, hvussu jarðfrøðin er við Føroyar, út frá kanningunum í Vøringøkinum – og tí at kanningar við Føroyar eisini kunnu útvega norðmonnum fleiri upplýsingar um teirra egna økið.

Statoil skipar mikudagin fyri eini lítlari ráðstevnu fyri føroysku sendinevndini og pressuni. Tá fara serfrøðingar hjá felagnum at greiða frá norsku royndunum í oljuvinnuni og eisini at koma inn á spurningar, sum kunnu hava serligan áhuga fyri Føroyar. Eitt nú fara teir at greiða frá kanningunum í Vøringøkinum.

Umleið 15 føroyingar eru á messuni í Stavanger. Umframt umboð fyri útvarpið, sjónvarpið og Sosialin, so er stórur partur av oljuráðleggingarnevndini her. Harumframt eru nøkur umboð fyri føroyskt vinnulív.

*Bussurin meira enn fullur!?*

# Forsvarligt

*– sigur bussførarin*



*Fult forsvarlig koyring, sigur bussførarin.*
*Savnsmynd: Kalmar*

Ikki sluppu øll við Leirvíks-bussinum av Farstøðini um hálvgunfimmtíðina týskvøldið, tí so mong høvdu teknað seg til túrin í samband við fótbóltsdystin á Svangaskarði.

Eitt av ferðafólkunum hevur greitt blaðnum frá, at bussurin var nógv meira enn fullur. So fullur, at hópur av fólki máttu standa í bussinum allan vegin til Søldarfjarðar, har skift varð til annan buss út á Toftir. Ferðamaðurin setir spurnartekin við trygdina tá so mong eru í bussinum.

Hákun Zachariasen var bussførari á Leirvíksleiðini hendan dagin. Hann sigur seg einki kann til yvirfyltan buss. Tað, sum møguliga hevur tókst eitt sindur ógvusligt fyri okkurt av ferðafólkunum man helst vera tað, at helmingurin av ferðafólkunum vóru børn, og tey sita ikki í frið. Tey sita eina løtu og fara so at vála. Hákun Zachariasen sigur, at hann hevði ikki fleiri fólk við í bussinum enn tað hann helt seg kunna koyra fult forsvarligt.

**tór.-**

# Jákup í Skemmuni heiðraður í Svøríki

Jákup í Skemmuni, týðari, hevur fingið 20.000 sv. krónur frá svenska rithøvundafelagnum í heiðursløn, fyri rúgvusmikla arbeiðið sítt at umseta barna - ungdóms- og vakstramannabøkur, tær flestu úr svenskum máli.

Jákup í Skemmuni hevur týtt umleið 100 bøkur til føroyskt mál.

**Dagny**

**Eliaskirkjan, Vesterbrotorv 49**

**Møti er hvørt leygarkvøld kl. 19.00.**

**Bussarnir 6, 16, 28 og 41 steðga nærindis.**

**Nærri fæst at vita á tlf. 031-242268 ella 031-578999.**